# Ivast stórliga í um fútin kann taka koyrikortið frá Tórbirni Jacobsen

**Øll bíða í spenningi eftir at sakarmálið ímillum Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmann og fútan, kemur til viðgerðar í Føroya Rætti í næstu viku**

POLITISKT ÓRIN
*Áki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– At taka koyrikortið frá Tórbirni Jacobsen, er ein partur av eini revsing og tað ivist eg í um fútin kann loyva sær, fyrrenn løgtingið hevur tikið órinið frá løgtingsmanninum, sigur ein av okkara royndastu løgfrøðingum, Tórbjørn Jacobsen*

– Eg ivist stórliga í um fútin uttan víðari hevur rætt til at taka koyrikortið frá Tórbirni Jacobsen.

Tað sigur Jógvan Páll Lassen, sum er ein av okkara royndastu løgfrøðingum.

Løgreglan hevur skuldsett Tórbjørn Jacobsen fyri at koyra við kenning og hevur tikið koyrikortið frá honum.

Men mikudagin visti Útvarpið at siga, at Tórbjørn Jacobsen hevur mótmælt at fútin hevur tikið koyrikortið og hann hevur lagt sak ímóti fútanum.

Sakarmálið kemur til viðgerðar í næstu viku og Bjørn á Heygum, sakførari hjá løgtingsmanninum, sigur, at talan er um eina prinsipiella sak, sum ongantíð fyrr er roynd í donsku rættarskipanini, sum Føroyar eisini hoyra undir.

Sum løgtingsmaður, hevur Tórbjørn Jacobsen politiskt órin. Tað merkir, at hann kann ikki rættarsøkjast fyrrenn Løgtingið hevur tikið politiska órinið frá honum.

Og akkurát hetta er kjarnin í málinum.

Spurningurin, sum Tórbjørn Jacobsen vil hava rættin at avgera, er, um fútin kann loyva sær at taka koyrikortið frá honum, tá ið tað ikki kann sigast við fullari vissu, at avgerðin um at taka kortið kann roynast í rættinum.

Hetta er ein spurningur, sum ongantíð er svaraður í donsku rættarskipanini. Men tað verður hann altso nú.

Eisini ein av okkara kendastu og royndastu løgfrøðingunum, Jógvan Páll Lassen, heldur, at talan er um eitt áhugavert sakarmál.

– Er tað so, at hetta ongantíð áður er roynt í rættarskipanini, er tað eitt mál, sum hevur størsta áhuga.

Sjálvur ivast hann í, um fútin kann loyva sær at taka koyrikortið frá løgtingsmanninum, tí hann hevur politiskt órin.

– At taka koyrikortið frá Tórbirni Jacobsen er ein partur av eini revsing. Men hendir tað nú, at tingið ikki tekur órinið frá løgtingsmanninum, kann hann ikki revsast. Og so hevur fútin kortini revsað hann av órøttum.

Tí heldur Jógvan Páll Lassen, at talan er um eitt sera áhugavert mál.

Annars er tað ongantíð hent, at fólkatingið ella løgtingið ikki hevur tikið órinið frá einum tinglimi, sum verður ákærdur fyri lógarbrot.

– Orsøkin til, at tinglimir eru vardir av órinið, er fyri at verja teir ímóti at útinnandi valdið, sum er løgreglan og ákæruvaldi, ikki skal kunna fara eftir tí løggevandi valdinum, sum er tingið, uttan at tingið samtykkir tað fyrst. Men er talan um lógarbrot, hevur tingið altíð tikið órinið frá einum tinglimi.

### Ikki avleiðingar

Annars heldur Jógvan Páll Lassen ikki, at lógarbrotið hjá Tórbirni Jacobsen er so mikið grovt at tað eigur at fáa politiskar avleiðingar fyri hann.

- Brot á ferðslulógina verða vanliga ikki mett at vera so álvarslig lógarbrot at tað eigur at fáa politiskar avleiðingar. At koyra við kenning, verður vanliga revsað við hefti, sum er linari enn fongsul. Fyri at ein politikari skal missa tignina og at eitt revsimál sostatt eigur at fáa avleiðingar fyri ein politikara, skal talan verða um fongsulsrevsing í eina ávísa tíð, men tað verður tað ikki talan um í hesum sambandi.

Men danski politikarin, Hans Engell, segði fólkatingssessen frá sær eftir at hann hevði koyrt við kenning?

– Ja, men hann var leiðari fyri ein politiskan flokk, konservativa flokkin og harafturat forsætisráðharraevnið hjá flokkinum, so tað er øðvísi enn at vera vanligur tinglimur, sigur Jógvan Páll Lassen

# Rúsdrekkakoyringin eitt mál ímillum Tobba og fútan

**Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins vil ikki blandast uppí málið, har Tórbjørn Jacobsen er skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring**

RÚSDREKKAKOYRING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*At Tórbjørn Jacobsen hevur koyrt við kenning, hevur onki við tjóðvelfdisflokkin at gera, heldur Høgni Hoydal, formaður floksins*

– Hatta er eitt mál ímillum Tórbjørn Jacobsen og fútan.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins hevur als ongar viðmerkingar til, at ein av tingmonnum tjóðveldisfloksins, Tórbjørn Jacobsen, nú er skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring og at løgreglan hevur tikið koyrikortið frá honum.

Løgreglan tók Tórbjørn Jacobsen tíðliga ein sunnumorgun. Illgruni varð um, at hann hevði koyrt við kenning og tí varð blóðroynd tikin av honum. Løgreglan tók eisini koyrikortið, men tá fekk hann kortið aftur.

Men mikudagin visti Útvarpið, at nú úrslitið av blóðroyndini er komið, hevur løgreglan aftur tikið koyrikortið frá tingmanninum og hevur skuldsett hann fyri rúsdrekkakoyring.

Men sambært Høgna Hoydal, formanni tjóðveldisfloksins, er hetta ikki eitt mál, sum viðkemur tjóðveldisflokkinum.

Hann sigur tvørturímóti, at hetta er eitt mál ímillum Tórbjørn Jacobsen og fútan.

Sostatt hevur Høgni Hoydal heldur ikki sett seg inn í málið, tí hann hevur onki við tað at gera.

Men tjóðveldisflokkurin orðaði fyri nøkrum árum síðani ein rúsdrekkapolitikk.

Tað ásannar Høgni Hoydal og sambært honum, er rúsdrekkapolitikkurin framvegis í gildið.

Men eftir hansara tykki er hetta ikki ett brot á tann politikkin.

– Rúsdrekkapolitikkurin hjá tjóðveldisflokkinum snýr seg um ein rúsdrekkapolitikk í samband við tað politiska arbeiði fyri flokkin og ikki um, hvat fólk gera privat, sigur Høgni Hoydal.

Og aðrar viðmerkingar hevur hann ikki til málið.

## Porkeningar taka bygdarsavnið í nýtslu í dag

**Eftir at hava arbeitt við málinum í nógv ár, verður bygdarsavnið í Porkeri tikið alment í nýtslu í dag**

BYGDARSAVN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í nógv hava porkeningar arbeitt fyri at seta eitt bygdarsavn ástovn í bygdini.

Og nú er komið so langt, at bygdarsavnið verður tikið alment í nýtslu í dag.

Tað verður gjørt klokkan 18 í dag, tá ið bjóðað verður til almenna móttøku í bygdarsavninum, sum er í gamla skúla.

Tá fara tey at greiða frá bygdarsavninum og fornminnafelagnum í Porkeri og síðani ber til at síggja savnið og teir lutir, sum tey hava fingið í varðveitslu.

Gamli skúlin í Porkeri er settur í prýðiligan stand til at hýsa bygdarsavninum og skúlin er eina vitjan verdur í sær sjálvum, ikki minst tí at Johan Dam, vanliga nevndur Hannekiss, hevur æðramálað hann.

Porkenningar siga, at hetta mann vera eitt tað seinasta meistaraverkið undan hansara hondum.

Samstundis frætta tey í felagnum fegin frá fólki, sum hava søguligar og forvitnisligar lutir, sum tey vilja læna savninum ella sum tey vilja lata savnið hava í varðveitslu.

Vit halda, at gamli skúlin í sjálvum sær er sera prýðiligum innan. Hann er æðramálaður, og tað er Johan Dam »Hannekis« sum stóð fyri tí. Hetta man vera eitt av teimum seinastu meistaraverkunum, sum hann hevur gjørt.